

## Pápin átti stóran leiklut í FM-heitinum hjá VB

Robert Cieslewicz, pápi Lukasz, átti stóran leiklut í føroyameistaraheitinum, sum VB vann óvæntað í 2000. Tað hevur ofta eydnast væl við útlendingum hjá fótbóltsfelagnum í Vági. Árið í 2000 var einki undantak. Robert Cieslewicz var við sínum níggju málum í 17 landskappingardystum ein brandur í álopinum undir liðini á Kryzstof Popczynski, sum var leikandi venjari. Milan Kulic var álitismaður á miðvøllinum sama árið. Tað var Piotr Krakowski, ið var venjari hjá ÍF, sum fekk Robert Cieslewicz til Føroyar og Fuglafjarðar undan kappingarbyrjan í 1999. Tað riggaði hinvegin ikki serliga væl, tí Cieslewicz var ikki serliga eyðsýndur á niðurflytingarliðnum. Framherjin flutti síðan til Vágs, har hann spældi til 2002. Í 2003 og 2004 var hann leikandi venjari hjá Sumba.

# Cieslewicz ætlar sær á landsliðið

**FÓTBÓLTUR** Lukasz Cieslewicz, sum flutti úr Føroyum fyri gott og væl sjey árum síðan, fekk ongantíð gjøgnumbrotið í donskum fótbólti, sum hann vónaði. Nú fer framherjin at spæla við B36 við vón um eitt pláss í føroyska landsliðshópinum

Uni Holm Johannesen

Lukasz Cieslewicz er greiður í viðtalu við heimasíðuna hjá B36.

– Fyri meg er talan um røttu løtuna at koma til føroyskan fótbólt. Persónliga strembi eg altíð eftir at vinna, og tí stendur føroyameistaraheitið við B36 ovast á listanum yvir míni persónligu mál. Hartil havi eg eitt ynski um at spæla á føroyska landsliðnum, og tað er ein møguleiki, sum eg vil royna at gera til veruliga, sigur Lukasz Cieslewicz.

Pólski framherjin, sum hevur verið knýttur at ungdómslandsliðnum hjá Póllandi, fekk sína fótbóltsuppaling í Vági. Pápi hansara, Robert Cieslewicz, var á liðnum hjá VB, sum vann føroyameistaraheitið í 2000, umframt at hann hevur umboðað ÍF og Sumba.

Árini í Føroyum um aldarskiftið geva Lukasz Cieslewicz møguleikan at spæla á landsliðnum. Hann hevur búð í Føroyum í fleiri enn sjey ár, sum er kravið, um tú skal skifta tjóðskap. Tað skuldi tí borið til at fingið neyðugu pappírini í rættlag.

Cieslewicz hevur verið við á nøkrum venjingarlegum hjá pólska U21-landsliðnum, men hann hevur ikki spælt nakran skrásettan dyst. Tí kann Brian Kerr, landsliðsvenjari, gera sær dælt av framherjanum, um hann fær føroyskan tjóðskap.

Tað er líkt til, at dreymurin um at spæla landsliðsfótbólt vigaði nógv, tá hann gjørdi av at skifta til B36. Framherjin segði við donsku heimasíðuna bold.dk síðsta summar, at hansara ambitiónir vóru at spæla í bestu donsku deildini.

– Eg noyðist víðari. Tíðin er búgvin at spæla á einum hægri støði, annaðhvørt í Superliguni ella í oddinum í næstbestu deildini, segði pólski framherjin tá.

Hann valdi hinvegin at verða verandi í Hvidovre, har hann eisini hevur spælt seinastu mánaðirnar. Hvidovre er í svárum fíggjarligum trupulleikum og kann ikki skriva sáttmála við leikarar, sum støðan er.

Cieslewicz sigur við bold.dk í morgun, at hann vil spæla sum yrkisspælari, og tað hevði hann ikki møguleika til í Hvidovre. Tað tilboðið hevur hann hinvegin fingið í B36, har hann fer at liva av at spæla fótbólt.

## Kennir livimátan

Viðhaldsfólkini hjá B36 fegnaðust, tá heimasíðan hjá felagnum kunngjørdi, at Cieslewicz er knýttur at hópinum.

23 ára gamli framherjin fór til Brøndby sum 16 ára gamal, men slapp ongantíð at spæla fyri besta liðið. Í 2008 skifti hann til Hvidovre, sum spælir í næstbestu donsku deildini.

Cieslewicz vónar at vera við til at lyfta B36 hægri upp á stigatalvuni.

– Eg vóni, at eg kann geva felagnum nakað. B36 er í holt við at byggja eitt nýtt lið upp, og hóast eg eri 23 ár, so haldi eg, at eg havi nakrar royndir, sum eg kann geva frá mær. Ikki minst, tí eg havi livað og spælt sum yrkisspælari, og tí kenni eg tey krøv, sum verða sett um kostvanar, venjingar og livimáta sum heild, sigur hann við heimasíðuna hjá B36.

Lukasz Cieslewicz er framrættaður spælari. Hann trívist best sum framrættaður miðvallari.



**YRKISSÁTTMÁLI**

*Lukasz Cieslewicz og Sámal Ímundarsson, B36-formaður*

*Mynd: www.b36.fo*

» **Persónliga strembi eg altíð eftir at vinna, og tí stendur føroyameistaraheitið við B36 ovast á listanum**

## FAKTA:

**Navn:** Lukasz Cieslewicz
**Føðingardagur:** 15. november, 1987
**Pláss:** Miðvøllur og álop
**Fyrrverandi feløg:** VB, Brøndby og Hvidovre



*Lukasz Cieslewicz fór frá VB til danska stórfelagið Brøndby sum bara 16 ára gamal.*